

# Nýtt spennandi starv sum controllari/roknskaparfólk í TF-Holding

**TF-Holding, sum m.a. eigur Tryggingarfelagið Føroyar P/F og Betri pensjón P/F, skal liva upp til herd roknskaparkrøv í samband við nýggja tryggingarlóggávu og er í hesum sambandi í holt við at styrkja um fíggjarligu stýringina og stýringina av virkseminum.**

Fyri at lúka herdu og øktu krøvini hava vit tørv á einum controllara/roknskaparfólki, sum skal vera við til at byggja víðari á og viðlíkahalda hesa rapportering.

## Vit kundu hugsa okkum at tú

Hevur roknskaparførleika og førleika at arbeiða við fíggjarstýringsskipanum og rapportering úr hesum og/ella hægri útbúgving sum t.d. HD-R, Cand. Merc. ella líknandi.

Og harumframt hesar fakligu og persónligu eginleikarnar:

> Góðan førleika í Excel rokniarki
> Góðan KT førleika
> Góð samstarvs – og samskiftisevni
> Áræði
> Nátúrligan myndugleika
> Analytisk evnir
> Broytingarsinni
> Kann arbeiða sjálvstøðugt
> Góð/ur at halda freistir

## Vit kunnu bjóða tær

Fjølbroytt og avbjóðandi starv í eini spennandi fyritøku, sum er í stórari menning. Eitt starv í eini fyritøku við greiðum málum, virkisfúsum starvsfólkum og góðum arbeiðsumstøðum. Ein fyritøka við fimm ítøkiligum kjarnuvirðum. Har vit hava vilja til lønandi vøkstur, virða heildina, eru ágrýtin og nærløgd, hava eina langtíðarhugsjón og eru broytingarsinnað.

Til rætta fólkið hava vit eitt gott og avbjóðandi starv við kappingarførari løn, góðum setanartreytum, sjálvstøðugum arbeiðsøki og góðum møguleikum fyri støðugari førleikamenning, har viðkomandi sjálvur/sjálv verður við til at byggja starvið upp og mynda tað frameftir.

Talan er um nýtt starv, so tillagingar kunnu møguliga ávirka uppgávuinnhaldið.

## Lønar-og setanartreytir

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Yrkisfelagið Trygdina og Arbeiðsgevarafelagið fyri fíggjarstovnar í Føroyum.

Lønin verður ásett í mun til royndir og førleika.

Er hetta nakað fyri teg, ella hevur tú spurningar til starvið, kanst tú seta teg í samband við Heina Joensen, deildarstjóra á tel 34 56 00 ella far. tel 21 57 09.

Umsóknarfreistin er 30. september 2009 kl. 12.00.

Umsókn við avriti av viðkomandi prógvum skal sendast til:
Tryggingarfelagið Føroyar
Starvsfólkadeildin
Postsmoga 329
FO-110 Tórshavn

TF HOLDING

# Leys størv í Tórshavnar kommunu

www.torshavn.fo

## KONTAKTPERSÓNUR

**Søkt verður eftir kontaktpersóni til 11 ára gamlan drong. Talan er um 10 tímar um vikuna eftir skúlatíð/vikuskifti.**

**FØRLEIKAKRØV**

Ynskiligt er, at tann, ið settur verður, hevur viðkomandi royndir innan økið.

**SETANARVIÐURSKIFTI**

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og KAF.

**UMSÓKN**

Umsóknir við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu vera hjá Tórshavnar kommunu, Barnaverndartænastan, Postboks 32, 110 Tórshavn, í seinasta lagi fríggjadagin 16. oktober 2009.

**MEIRI FÆST AT VITA**

um starvið við at venda sær til Barnaverndartænastuna á telefon 30 20 60.

## SKRIVSTOVUFÓLK

**Tórshavnar kommuna søkir vegna Tjarnargarð eftir skrivstovufólki.**

Starvið umfatar lønarroknskap og annað fyrifallandi skrivstovuarbeiði.

Arbeiðstíðin er 30 tímar um vikuna.

**FØRLEIKAKRØV**

skrivstovuútbúgving og arbeiðsroyndir av líknandi slag. Kunnleiki til sáttmálar hjá heilsustarvsfólki er ein fyrimunur.

**SETANARVIÐURSKIFTI**

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Starvið verður sett skjótast til ber.

**MEIRI FÆST AT VITA**

um starvið við at venda sær til Hensiu Einarsson, leiðara, telefon 30 20 75 ella 21 40 75.

**UMSÓKN**

saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndum skal vera hjá Tórshavnar kommunu, postboks 32, 110 Tórshavn, í seinasta lagi mánadagin 12. oktober 2009.

**TÓRSHAVNAR KOMMUNA ER LANDSINS STØRSTA KOMMUNA.** Í kommununi starvast tilsamans 1400 fólk, harav 130 fólk í sjálvari umsitingini. Vit leggja sera stóran dent á fakliga menning og trivnað. Arbeiðsumhvørvið er fjølbroytt, og vit hava eina nútímans og opnan leiðsluhátt, har starvsfólkamenning er avgerandi. Vit hava ein virknan starvsfólkapolitikk og raðfesta vit somuleiðis innanhýsis samskifti og samskifti við borgaran høgt. Hetta fyri at tú og borgarin altíð skulu kenna tykkum væl í Tórshavnar kommunu. **Les meira um starvsfólkapolitikkin á www.torshavn.fo**

TÓRSHAVNAR KOMMUNA